# Framgongd hjá Sambandinum stendst av savnandi løgmanni

**Sambandsflokkurin gongur fram við 10 prosentum í seinastu veljarakanningini. Øssur Winthereig, journalistur, heldur, at flokkurin skorar upp á løgmanseffektina. - Kaj Leo Johannesen stendur sum ein savnandi og fittur løgmaður, sum heilt vist vil øllum tað besta. Tað vilja fólk hava, heldur hann**

Uni Arge




Vanliga verða flokkar revsaðir fyri at hava valdið, serliga í truplum tíðum, og Javnaðarflokkurin fær eisini av at vita í seinastu veljarakanningini, sum Sosialurin almannakunngjørdi mikudagin. Flokkurin hevði fingið einans 13 prosent av atkvøðunum, um val var í dag, og skríður tí í skæðuni eftir seks ár við stýrisvølin í Tinganesi.

Øðrvísi er við Sambandsflokkinum. Hann gongur heili 10 prosent fram samanborið við seinasta val, úr 21 prosentum upp í 31 prosent. Hví so er, er ikki trupult at rokna út, heldur Øssur Winthereig, journalistur.

– Vit mugu bara viðurkenna, at talan er um eina løgmanseffekt. Kaj Leo Johannesen stendur sum ein savnandi og fittur løgmaður, sum vil øllum tað besta, og tað dámar okkum. Hini landsstýrisfólkini, eisini landsstýrisfólkini hjá Sambandsflokkinum, standa fyri niðurskurðum, sjuski og kanska dugnaloysi. Men Kaj Leo er tann sami. Hann og Danmark standa fyri tí trygga, sigur hann.

Øssur Winthereig heldur tó ikki, at samgongan skal spenna bringuna ov langt fram orsakað av samlaða prosenttalinum hjá Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Hetta talið, góð 60 prosent, sigur nevniliga ikki nógv um undirtøkuna fyri sjálvari samgonguni, heldur hann.

– Flytingarnar millum samgonguflokkarnar kunnu eins væl siga, at har er ónøgd við tað, sum flokkarnir standa fyri og gera. Væl kann eisini hugsast, at summi stuðla til dømis Fólkaflokkinum, men halda ikki, at hann er rættari leið í samgonguni. Eg haldi ikki, at Kaj Leo Johannesen kann taka samlaða prosenttalið hjá samgonguni sum eitt herðaklapp til samgonguna, men eitt herðaklapp til hansara er tað heilt vist, sigur Øssur Winthereig.

## Má vera greiður

Afturgongdin hjá Javnaðarflokkinum er so álvarslig, at undirtøkan hevur ikki verið minni síðan 1932. Hetta man svíða ikki sørt í flokkinum, og spurningurin er so, hví hann verður revsaður so dyggiliga.

Summi hava nevnt, at hann er sum lús ímillum tvær negl í samgongu við tveimum borgarligum flokkum, og at hann í Fíggjarmálaráðnum hevur verið ímyndin um bæði sparingar og afturhald í lønarsamráðingum. Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, nevndi eisini mikudagin, at javnaðarveljarar enn ikki eru komnir yvir, at flokkurin var í CHE-samgonguni. Øssur Winthereig hevur eitt stutt boð upp á afturgongdina hjá Javnaðarflokkinum:

– Í somu løtu flokkurin veit, hvat hann vil og meinar, og torir at standa við tað, so verður betri hjá Javnaðarflokkinum, sigur hann.

Alt bendir á, at Javnaðarflokkurin fór at formulera fyri sær sjálvum og øðrum, hvørjum hann stendur fyri, samstundis sum veljarakanningin varð almannakunngjørd. Løgmaður fekk ið hvussu er snarboð frá flokkinum, at hann noktaði at skerja vælferðina meira, og flokkurin pussaði á hendan hátt sínar fjaðrar mótvegis kjarnuveljarunum í heilsuverkinum, á almannaøkinum og í skúlaverkinum.

## Støðugur flokkur

Tjóðveldi tykist sambært veljarakanningini at liva eina seiglívaða tilveru. Flokkurin hevur heilt síðan 1998 staðið seg væl á øllum valum, og hóast hann sum andstøðuflokkur kundi væntast at gingið nógv fram, so eru ótryggu tíðirnar ikki við flokkinum. Kortini gongur hann fram úr 23,3 prosentum upp í 24,6 prosent. Øssur Winthereig heldur hetta vera áhugavert.

– Tað er áhugavert, at meðan hinir flokkarnir sveiggja, so sveiggjar Tjóðveldi ikki og eigur fjórða hvønn veljara í landinum, sigur hann.

Støðugleikin hjá teimum smærru flokkunum er týðiligur. Sjálvstýrisflokkurin fær 7,2 prosent í kanningini, ið er tað sama sum í valinum í 2008. Miðflokkurin gongur eitt vet aftur, úr 8,4 prosentum niður í 7,8 prosent, ið tó má metast sum støðugt. Fólkaflokkurin dettur úr 20,1 prosenti niður í 16,4 prosent, kanska orsakað av rumblinum um Poul Michelsen og mótganginum í grannskoðaramálinum, har fyrrverandi landsstýrismenn hjá flokkinum kunnu enda undir ákæru.

Hvussu er og ikki, so er talan bara um eina kanning, har óvissan um tølini kann vera stór. Øssur Winthereig heldur, at óvissan í tølunum kann vera eini fimm prosent báðar vegir, og so kundi hann fegin hugsað sær at hoyrt Granskingardepilin og Fynd, ið hava gjørt kanningina, greitt frá nýggja háttinum at gera veljarakanningar við telduposti.

– Eg ivist ikki í, at gongdin, sum vísir seg í kanningini, er røtt. Men eg kundi hugsað mær at hoyrt meira um háttin at gera kanningina og tey, sum ætla at velja blankt ella als ikki ætla at fara á val. Tílíkar upplýsingar hava stóran týdning, tá metast skal um eina veljarakanning. Her hevur framløgan av kanningini ikki verið nóg góð, heldur Øssur Winthereig.



***Kaj Leo Johannesen er ein fittur og savnandi løgmaður, sum heilt víst vil øllum tað besta, og tað er tað, sum fólk vilja hava, heldur Øssur Withereig, journalistur***